# Bank Connect

## Hvat er BankConnect?

**Bank Connect** er ein talgild loysn til vinnukundar, sum knýtur bókhaldskipanina hjá eini fyritøku (ERP/bókhaldsskipan) beinleiðis saman við bankan.

Loysnin gevur vinnukundum gjøgnum teirra roknskaparskipan møguleika at:

- fáa dagligar bókingar uttan at brúka netbankan
- gera gjaldingar, sum seinni skulu góðkennast í netbankanum
- gera gjaldingar beinleiðis úr ERP-/bókhaldsskipanini

## Tríggjar avtalur eru at velja ímillum

- **Dagligar bókingar**
  Við hesi avtaluni kanst tú fáa dagligar bókingar inn í bókhaldsskipanina.

- **Flytingar við góðkenning í netbankanum**
  Við hesi avtaluni kanst tú avgreiða flytingar umvegis bókhaldsskipanina við at senda gjaldingar til útbakkan í netbankanum. Her verða flytingarnar góðkendar eftir loyvinum, sum kundin hevur í netbankanum. Við hesi avtaluni sært tú eisini dagligar bókingar í bókhaldsskipanini.

- **Flytingar uttan góðkenning í netbankanum**
  Við hesi avtaluni kanst tú gera flytingar umvegis bókhaldsskipanina uttan at góðkenna tær í netbankanum. Tú sært eisini dagligar bókingar í bókhaldsskipanini.

## Hvat krevst fyri at brúka Bank Connect?

- Tú skalt hava eina avtalu við tín peningastovn.
- Tín roknskaparskipan skal kunna samskifta við Bank Connect. Set teg í samband við veitarin av tíni bókhaldsskipan, um hetta.

## Stovna Bank Connect

Um tú kundi hugsað tær, at vit stovna felagnum eina avtalu um Bank Connect, kanst tú senda okkum eini netbankaboð ella venda tær til tín kundaráðgeva.